# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/14 - 7. mars 2024 16:00-18:00

### Skrá:

1. Telefonpolitikkur.
2. Køkurin.
3. Fyrispurningur um Parkour.
4. Lýsing um lektiuhjálp.
5. Felags fund fyri foreldur.
6. Innskrivingin í grunddeild.
7. Ítróttarrásin og ónøgd av øðrum skúlum.
8. Ymiskt.
   - Teldupolitikkur.
   - MÁL (salatbarrin) og nýtslu av føroyskum tilfeingi og grønmeti framleiðsluni.
   - Heilsugóður kostur - Hvat inniber tað tá Skúlin á Fløtum skrivar tað á heimasíðuni.
   - Matur okkara tilfeingi
   - Rithøvundavitjan, men einans fyri 3 flokki.
   - P-básar til starvsfólk
   - Verkætlan hjá Vivian Sjóklett

9. Áseta næsta fund.

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Súsanna, Erla, Snorri, Sjúrður & Derhard |
| Forfall: | Bjørg |
| Gestir: | eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad. 1
**Telefonpolitikkur**
Uppskot til hoyringar
Uppskotið viðfest niðast:
Viðmerkingar:
Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at taka fartelefonpolitikkin hjá skúlanum upp til viðgerar saman við starvsfólkunum.
Skúlastýrið ynskir, at fyrsta reglan í politikkinum sigur. Í Skúlanum á Fløtum ynskja vit, at næmingar ikki hava fartelefon við í skúla. Síðani at reglunar siga at telefonir, ið kortini koma við í skúla standa í einum skápi í skúlatíð. Skúlastýrið ynskir at seta nýggja politikin í verk frá skúlaársbyrjan 24/25 og at hesar samsvara nýggju reglurnar frá BUMR.

Ad. 2

**Køkurin**

Lágargarður yvirtekur køkin í á leið 1,5 ár.
Ætlanin er at tey økja sítt virksemi til okkara í ávísan mun.
Givið høvið at fara undir onkra roynd í heyst.
Viðmerkingar:
Skúlastýrið fegnast um at kantinan verður virkin og ynskir í tann mun tað letur seg gera at víðka teirra virksemi til eisini at fevna um veiting av mati til skúlan. Møguliga í onkrum forprojekti.

Ad. 3

**Fyrispurningur um parkour**

Parkourfelagið ynskir at seta upp bana inni.
Til ber ikki at nýta høllina.
Leiðslan hevur kanna eitt øki á háslættanum.
Niðurstøðan er tó, at krøvini til trygd, fallundirlag og festi ikki kunnu lúkast og at økið ikki kann læsast av, tá eingin umsjón er. Umbønin er noktað og málið lokað.
Tó er Parkourbanin uttanfyri fríur at nýta. Eisini hjá parkourfelagnum.
Skúlastýrið tekur undir við hesi avgerð, men ynskir at kanna møguleikarnar fyri at menna rørðsluøkið í hádeild. Foreldraumboðini í skúlastýrinum taka hetta á seg.

Ad. 4.

**Lýsing um lektiuhjálp**

Starvsfólk hava umvegis starvsfólkaumboðið sagt frá, at tey ivast í, um tað er rætt, at felagsskapir sleppa at lýsa við t.d. lektiuhjálp. Talan er um PAIS og GX international.
Skúlastýrið hevur fyrr tikið loyvið hjá PAIS aftur. Tá var talan um spæl í fríkorterunum.
Starvsfólkini ynskja greiðar reglur fyri hvørji samstørv eru og hvørjir felagsskapir lýsa við virksemi á skúlanum, ið leggur seg upp at skúlavirkseminum.
Viðmerkingar:
Skúlastýrið heldur at allir skipaðir frítíðarfelagsskapir eiga at sleppa at lýsa við sínum virksemi. Tað er tó ynskiligt at tað er gjøgnumskygt og greitt hvør tað er sum bjóðar og hvat endamálið er í lýsingini.

Ad. 5.

**Felags foreldrafundur**

Skúlastýrið skipar á hvørjum ári fyri felags foreldrafundi.
Leiðslan mælir til at hesir eru í apríl.
Hvat evni skulu vit taka upp og hví?
Viðmerkingar:
Uppskot til evni 1
Telefonpolitikkur, telefonir og ávirkanin telefonin hevur á barnalívið, familjulívið og tað góða lívið sum heild.
Uppskot til evni 2
Matur, kostur, matmentan, matnáðir og matætlanir við kantinuni

Alternativt ber til at halda fundin í heyst og halda hann sum uppstillingarfund við temaum.

Skúlastýrið er samt um at halda fundin í heyst, og temaið helst skal vera matumhvørvis- og kantinurelaterað, tí kantinan mest sannlíkt er virkin um hetta mundi samstundis sum hetta skal vera uppstillingarfundur.

Ad. 6.
**Innskriving í grundddeild**
Lógaruppskot er úti, ið leggur upp til lækkað næmingatal í flokkunum.
Uppskotið er sent til hoyringar. Hoyringarfreistin er farin. Uppskotið er her:
https://landsstyri.cdn.fo/savn/3yhfm3hy/uppskot-til-ll-um-broyting-%C3%AD-ll-um-f%C3%B3lkask%C3%BAlan-grein-20-naemingatali%C3%B0-190124.pdf?s=vtGosH4uTmtATy3sU_XJgKYFtLc
Fyri okkum merkir hetta, at næmingar, ið longu eru komnir í forskúla hava eisini fingið pláss í 1.flokki.
Forskúlin er næum fult teknaður við 23, 23 og 24 næmingum í løtuni.
Hetta er fleiri enn ætlaðu 20 næmingarnir.

Leiðslan biður stýrið um at viðgera ynskið hjá leiðsluni um at varðveita 3 spor og fara upp um 20 tó ikki upp um 24 næmingar í hvørjum flokki; heldur enn at taka flytiflokkar inn og býta árgangin sundur, um lógaruppskotið kemur ígjøgnum.

Skúlastýrið tekur undir við hesi avgerð at galda fyri skúlabyrjan 24/25 og 25/26 tí tey sum byrja í 1.fl 25/26 eru longu upptikin í forskúla 24/25. Skúlastýrið ynskir at eitt komandi skúlastýri tekur hetta upp fyri árini eftir hetta.

Ad. 7.
**Ítróttarrásin og ónøgd av øðrum skúlum.**
Skúlastýrini í nøkrum av hinum skúlunum hava verið ógvuliga aktiv í málinum um, um Skúlin á Fløtum kann bjóða út avlopspláss. Og um Skúlin á Fløtum kann taka ímóti næmingum longu í 7.flokki heldur enn 8.flokki sum mannagongdin hevur verið higatil.

Leiðslan heitir á stýrið at staðfesta umsóknina um royndarvirksemi við tillagðarari tímatalvu, innihaldi og virksemi á skúlanum.
Harafturat heitir leiðslan á stýrið at staðfesta at Skúlin á Fløtum er móttøkuskúli i 7.flokki og ikki 8.flokki, sum aðrir skúlar vilja hava.

Víst verður til avgerð í býráðnum februar 2022 og gerabók har tað verður sligið fast, at Skúlin á Fløtum er móttøkuskúli í 7.flokki.
Víst verður eisini til játtan av roynarvirksemi, ið fevnir um skúlaárini 23/24, 24/25 og 25/26.

Leiðslan heitir eisini á kommunalu umboðini at arbeiða fyri hesum leisti, ið tey sjálv hava staðfest og atkvøtt ígjøgnum, so at skúlin fær frið at arbeiða innanfyri givnar og játtaðar karmar.

Harafturat boðar leislan frá, at landstýrismaðurin í Barna og útbúgvingarmálum hevur heitt á leiðsluna um at avtaka fyrimunsregluna hjá Neistanum og Kyndli á hondbóltsrás. Hesum hevur leiðslan eftirlýkað hóast hetta kanska kann føra við sær at tey taka seg úr samstarvinum.
Leiðslan mælir stýrinum at taka undir við hesi avgerð.

Viðmerkingar:
Skúlastýrið staðfestir avgerðina hjá leiðsluni um at avtaka fyrimunsregluna.
Skúlastýrið  staðfestir at Skúlin á Fløtum er móttøkuskúli í 7.flokki og heitir á leiðsluna um at virka innanfyri hendan karmin.
Skúlastýrið heitir eisini á kommunalu umboðini at arbeiða fyri at hesin samtykti bygnaðurin verður varðveittur.
Harafturat leggur skúlastýrið áherðslu á at royndarverkætlanin heldur fram óskalað í royndartíðarskeiðnum á 3 ár fyri at granskingarúrslinini kunnu nýtast eftir upprunaendamálinum at kunna menna eina skipan og bygnað til alt skúlaverki og fólkaskúlan.

Ad. 7.
**Ymiskt**
Teldupolitikkur
- Foreldraumboð ynskir at eins einfaldar mannagongdir og reglur eru galdandi fyri skúlatelduna sum fyri fartelefonir. At teldan er eitt amboð ikki ein leika. Heitt verður á skúlan at kanna møguleikan fyri avmarkingum á teldunum. Skulastýrið fer at arbeiða við hesum mannagondum í heyst.

Mál,
- Hava tey svarað uppá fyrispurningin í heyst.
- Ja, tey hava svarað. Tey kunnu ikki innanfyri fíggjarkarmin veita føroyska vøru. Og kunnu bara í ávísan mun liva upp til kostráðini.
- Tey góðtaka at ikki standa á saf.fo

Rithøvundavitjan
- matur okkara tilfeingi. At hetta eisini skal fevna um fleiri enn 3.fl.
- Kann tað fevna um fleiri flokkar – ella allan skúlan?
- Evt til foreldrafundir eisini.

p-básar til starvsfólk
- Starvsfólk ynskja p-básar til starvsfólk.
- Leiðslan ger skriv til Glasir
- Merkja básar

Verkætlan hjá Vivian Sjóklett
- Skúlastýrið tekur ikki undir við verkætlanini. Skúlastýrið ynskir at hetta eru viðurskifti og lærutilgongdir sum starvsfólk skúlans taka sær av.
- Harnæst mælir skúlastýrið til at um vit vit skulu viðgera eina slíka umsókn aftur at verkætlanin inniheldur ítøkiligar undirvísingargongdir at taka støðu til.

Ad. 8.
**Áseta næsta fund**
23. mai 2024 á Áarstovu SRA bókar og bíleggur fund 18 og mat 19

Vegna skúlastýrið

Regin Marnersson
skrivari

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Til allar fólkaskúlar

21. desember 2023
Mál: 21/17210-54
Viðgjørt: JL

**Meginreglur viðvíkjandi fartelefonnýtslu í fólkaskúlanum**

Heitt verður á allar skúlar um at endurskoða atferðarreglur skúlans við atliti at hesum meginreglum um fartelefonnýtslu í skúlatíðini.

Ásett er í § 60 í fólkaskúlalógini, at landsstýrismaðurin ger vanligar reglur um fyriskipanir til tess at fremja gott skil í skúlunum og um umsjón við næmingunum í skúlatíðini. Hesar reglur eru lýstar í kunngerð nr. 68 frá 9. juni 2010 um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini.

Við støði í hesum reglum ger skúlastýrið í einstaka skúlanum sambært § 53, stk. 5 í lógini atferðarreglur skúlans eftir uppskoti frá skúlaleiðaranum. Skúlarnir eiga at hava fyriskipanir um øll viðkomandi viðurskifti eisini viðvíkjandi fartelefonnýtslu bæði í tímum og fríkorterum.

Heimildin at skipa fyri, um fartelefonir verða nýttar í skúlatíðini, er ábyrgdin hjá einstaka skúlanum, og er tað skúlastjórin, sum sambært § § 55, stk. 3 í lógini tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum í skúlatíðini, og sum sambært § 2 í kunngerðini hevur ábyrgd av at seta fyriskipanir í verk. Skúlaleiðarin heldur seg til atferðarreglur skúlans, tær meginreglur, sum eru ásettar fyri skúlan sambært § 55, stk. 1 í lógini og tær kunngerðir, sum eru galdandi á økinum.

Í atferðarreglum skúlans skal verða ásett:

- at fartelefonnýtsla ikki er loyvd í skúladegnum, hvørki í undirvísingartímum ella fríkorterunu,
- at skúlin hevur eina skipan, har næmingurin leggur fartelefonina frá sær, tá ið hann kemur í skúla
- um næmingur ikki heldur hesar reglur, so kann skúlin taka fartelefonina frá næminginum og
- at næmingarnir fáa fartelefonirnar aftur, tá ið skúladagurin endar.

Skúlin hevur ikki heimild at leggja hald á fartelefonir eftir loknan skúladag, men skal gera eina skipan, har næmingarnir ikki nýta fartelefon í skúlatíðini. Undantøk kunnu tó vera, um skúlin hevur gjørt av at nýta fartelefon sum amboð í ávísari undirvísingargongd.

Skúlin skal samstundis tryggja, at næmingar hava møguleika fyri at ringja til foreldrini, um hetta gerst neyðugt í skúladegnum, antin við at venda sær til flokslæraran ella annan lærara ella tær tænastur, sum skúlin hevur skipað.

Blíðar heilsanir

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Tinghúsvegur 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo